# – Eg fari altíð tíðliga á val

**– Tað var lætt at seta krossin hesaferð. Høgni Hoydal er mín maður, sigur fyrsti veljarin í Hvalvík í gjár, Jógvan Hanusarsson**

FÓLKATINGSVAL '05
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fyrsti veljarin í Hvalvík kom á valstaðið kl. 9:20. Tað var Jógvan Hanusarsson úr Hvalvík.

– Eg eri eitt typiskt A-menniskja. Eri morgunmaður um ein háls, og tí fari eg altíð tíðliga á val, sigur hann, beint eftir at hava greitt atkvøðu.

Og fyri Jógvan er eingin ivi um, hvar krossurin skal setast. Hann hevur valt sama flokk síðani hann fekk valrætt.

– Eg ivist onga løtu í, at vit í Tjóðveldisflokkinum vinna stórsigur hesaferð, sigur hann.



*– Tað eru alt ov nógv valevni, sigur Jógvan Hanusarsson í Hvalvík. Fyri hann var tó eingin ivi um, hvar krossurin skuldi setast. Hann brúkti ikki langa tíð at finna fram við sín mann, Høgna Hoydal*

*Mynd :Jens Kr. Vang*

## Lættur krossur

Jógvan hevur verið sjómaður alt sítt lív. Í samfull 45 ár hevur hann verið til skips, og er tað enn.

Hann er við Skrápi, men fór ikki við henda túrin, sum teir byrjaðu mánakvøldið. Og tí kundi hann so eisini sleppa á val hesaferð, sum fyrsti veljari í Hvalvík.

– Eg má fáa hetta avgreitt sum skjótast. Nú fari eg eini ørindi yvir á Oyrar, og skal síðani ein túr til Havnar. So eg havi nógv á skránni í dag, sigur hann.

Hann fór inn í rúmið har atkvøðast skuldi, og evarska lítla løtu seinni er hann úti aftur og leggur atkvøðuna í kassan.

– Fyri mær er eingin ivi: Høgni Hoydal er mín maður. So tann krossurin var skjótur at seta, sigur Jógvan.

## Skrivar úrslitini niður

Jógvan hevur altíð fylgt væl við í tí politiska orðaskiftinum her á landi – heilt frá barnaárunum.

– Eg minnist at eg, so skjótt eg hevði lært meg at lesa, gleddi meg hvørja ferð at blaðið "14. September" kom út. Tað var eitt gott blað, sigur hann.

Uppundur hetta fólkatingsvalið hevur hann eisini roynt at fylgt væl við í orðaskiftinum, har hann avgjørdur metir, at flokkur hansara hevur klárað seg sera væl.

Valkvøldið plagar hann eisini at fylgja við í tí, sum fjølmiðlarnir bera fram. Hann skrivar úrslitini niður, og lurtar eftir viðmerkingunum.

– Tað eru ikki øll sum tíma hetta. Men eg veit, at tað ofta koma fólk inn til mín sum ikki hava so stóran áhuga fyri valinum.

– Men tá so úrslitini byrja at koma inn, gerast tey eisini spent uppá úrslitið, sigur Jógvan Hanusarsson.

## Ov nógv valevni

Tað varð nevnt í útvarpinum dagin fyri valið, at tað vóru so øgiliga nógv valevni til fólkatingsvalið í Føroyum.

Tað sjónarmiðið er Jógvan púra samdur í.

– Eg má faktiskt geva Johan í Kollafirði rætt í tí hann segði – tað er ikki alt líka býtt sum hann sigur! Hann helt, at hvør flokkur skuldi bara stilla tvey valevni upp.

– Var tað so, ivaðist eg onga løtu í at vit í Tjóðveldisflokkinum fingu bæði umboðini. Hetta valið verður nevniliga eitt gott tjóðveldisval, sigur Jógvan at enda.

# Tey flestu velja eftir kl. 16

**Veljararnir í Hvalvík fara fyrst á val eftir loknan arbeiðsdag. Við valið í 2001 greiddu 131 fólk atkvøðu eftir kl. 16**

FÓLKATINGSVAL '05
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tey vóru har í góðari tíð. Valstýrið møtti væl áðrenn valhølið lat upp kl. 9. Tey byrjaðu beinanvegin at telja upp teir – enn! - blonku seðlarnar við øllum valevnunum á, hvørt upp í buntir við 25 seðlum.

Formaðurin, Gunnar Joensen hugdi í bøkurnar frá undanfarnum valum, og kannaði eftir, at alt var sum tað skuldi vera, bæði við nøvnum á veljarum, valevnum og øllum hinum formellu viðurskiftunum, sum skuldu vera í lagi.

Hann fór eisini eftir kassanum, har allar atkvøðurnar skuldu leggjast í. Vissaði seg um at hann var tómur, og lat hann síðani aftur beint fyri kl. 9.

Nú var bara at bíða eftir fyrsta veljaranum. Og hann kom tá klokkan var 9:20. Hesin maðurin, Jógvan Hanusarsson greiddi skjótt sína atkvøðu, og so var valið í Hvalvík byrjað.

Kortini vísa royndirnar frá undanfarnum valum, at teir flestu veljararnir ikki velja fyrrenn arbeiðsdagurin er lokin.

Við fólkatingsvalið í 2001 høvdu einans 30 av teimum íalt 211 valt á middegi. Kl. 16 var talið komið uppá 80, men eftir tað komu so tey 131 eftirverandi.

– Soleiðis hevur gongdin sum oftast verið á hesum valstaðnum, sigur Gunnar Joensen, formaður í valstýrinum við Sosialin.



*Alt er klárt til valið í Hvalvík. Formaðurin í valstýrinum, Gunnar Joensen kannar eftir at atkvøðukassin er tómur. Síðani verður hann stongdur og valið kann byrja*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Trý valevni í bygdini

Tað er ikki nógv sum bendi á at fólkatingsval er í Hvalvík. Onkur hendinga plakat var at síggja í bygdini henda illveðurskenda fyrrapartin – við innkoyringina tríggjar myndir av Edmundi Joensen úr Sambandsflokkinum, annars einki.

Kann vera, at onkur hevði hongt plakatir upp dagin fyri, men í øllum illveðrinum um náttina mundu tær vera farnar sín veg. Tí veðrið má sær ráða, óansæð um tað er val ella ikki.

Ikki fyrrenn við skúlan sóust tær næstu plakatirnar, sum vóru festar uttan á sjálvan skúlagarðin.

Hesar áttu m.a. tvey av valevnunum úr kommununi – Heðin Zachariassen og Rúna Sivertsen úr Fólkaflokkinum. Eitt triðja valevni er eisini úr kommununi, nevniliga Sunneva Kollslíð úr Tjóðveldisflokkinum, men av henni sóust ongar plakatir.

So er spurningurin um nøkur av hesum trimum valevnum fær so mikið av atkvøðum, at tey fáa sæti á fólkatingi.

## Góð valluttøka

Annars hava fólk í Hvalvíkar kommunu verið íðin at fara á val. Við løgtingsvalini hevur luttøkan ligið um tey 80 %, men við fólkatingsval heldur lægri.

Við valið í gjár høvdu íalt 289 fólk valrætt: Úr Hvalvík 150, av Streymnesi 138, meðan ein einstakur veljari er í Nesvík. Hesi velja øll í skúlanum í Hvalvík.

Gunnar Joensen upplýsir, at við valið í 2001 vóru 201 fólk á vali av 263, og gav tað eina valluttøku uppá 76,4 %. Við valið í 1998 var valluttøkan 72,4 %.

Nevnast kann, at við seinastu løgtingsvalini hevur kommunan átt løgtingsmann, nevniliga áðurnevnda Heðin Zachariassen.

## Valfriður

Valstaðið í Hvalvík hevur skift millum skúlan og gomlu kommunuskrivstovuna hesi seinastu árini, - í bygninginum, sum Føroya Banki átti á sinni.

Síðani løgtingsvalið og bygdaráðsvalið í fjør, er Hvalvík vorðin partur av tí stóru Sunda kommunu. Av hesi orsøk er kommunuskrivstovan ikki í nýtslu sum slík longur, og tí er valið aftur í skúlanum nú.

Børnini høvdu frí í gjár orsakað av valinum. Men tað vóru tey neyvan kedd um: Veðrið var einki serligt, og tey flestu teirra høvdu helst verið seint uppi kvøldið fyri, meðan tey gingu grýlur runt í bygdini. So í skúlanum valdaði friður – valfriður!

## Valluttøkan tíma fyri tíma

Við Fólkatingsvalið í 2001 vóru íalt 201 fólk á vali í Hvalvík, umframt tær 10 brævatkvøðurnar.

Eins og so nógva aðrastaðni vóru flestu fólkini í Hvalvík, Streymnesi og Nesvík á vali eftir loknan arbeiðsdag.

Niðanfyri prenta vit tíðirnar og talið av veljarum gjøgnum valdagin í Hvalvík fyri fýra árum síðani:

| Klokkutíð | Veljarar (íroknað brævatkvøðurnar) |
|---|---|
| 10 | 15 |
| 11 | 23 |
| 12 | 30 |
| 13 | 39 |
| 14 | 49 |
| 15 | 60 |
| 16 | 80 |
| 17 | 97 |
| 18 | 126 |
| 19 | 167 |
| 19:30 | 183 |
| 20 | 211 |